Nr. 31/2020

Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um veðurstovnin, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvar skal føroyski veðurstovnurin liggja?
2. Hvussu nógv fólk verða knýtt at veðurstovninum?
3. Nær letur veðurstovnurin upp við øktum virksemi?

Viðmerkingar:

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi er játtanin til veðurstovnin hækkað, og er hetta at fegnast um. Undir viðgerðini av fíggjarlógini eru fleiri ynski komin fram um, hvar veðurstovnurin skal liggja. Fyri at fáa greiðu á hvørjar ætlanir landsstýrið hevur við hesum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 21.10 2020

Beinta Løwe Jacobsen